# Jumboland fyri tey smáu

**Í Aalborg finst eitt innandura spæliland við alskyns aktivitetum fyri smærru børnini, og har ber saktans til at brúka ein dag, skuldi veðrið ikki verið til vildar**









– Jumboland er eitt innandura spæliland, sum er opið alt árið, og her koma familjur við børnum millum null og 13 ár at spæla og hava tað hugnaligt saman, sigur Jeanette Mærks, stjóri.

Og so kunnu foreldrini vera við í spælinum, ella tey kunnu slappa av og hugna sær við einum kaffimunni ella øðrum.

Spælilandið hevur nógvar ymiskar aktivitetir.

- Vit hava eitt nú eina ógvuliga stóra grulviskipan, eina laborynt, har bønini kunnu grulva, spæla ella hoppa alt eftir, hvat teimum nú líkar. Talan er um tað størsta av sínum slag í Danmark. Vit hava eisini kúlurúm, hoppiborgir og trampolinir og minibilar. Og fyri tey eitt sindur størri hava vit spælimaskinur, sigur Jeannette Mærks.

Felags fyri mest sum allar aktivitetirnar er, at børnini fáa loyvi at brúka kroppin og motorikkin. Og júst hetta ger, at tað eru fleiri institutiónir fyri rørslutarnað børn, sum vitja javnan, har børnini fáa venjing.

Jumboland er sum nevnt innandura, og er tí sera vælegnað til teir dagar, tá veðrið ikki kortini gjørdist so gott, sum vónað.

Spælilandið er ógvuliga spennandi fyri børnini, og tað finnast borð og stólar, har tað ber til at eta ein matpakka. Og tímir tú ikki ein smyrja ein við heiman ífrá, so ber eisini til at keypa sær okkurt heitt ella okkurt lætt at eta inni í Jumboland.

Jeanette Mærks sigur, at foreldur gera seg ofta út til at verða verandi meginpartin av einum degi, tá tey koma við børnunum, og tað er eingin trupulleiki at halda teimum í gongd alla tíðina.

Tá talan er um eitt innandura spæliland, so liggur hásesongin hjá Jumboland frá oktober til umleið fyrsta apríl, og tað er eisini í hesum tíðarskeiðinum, at teir flestu av teimum 80.000 vitjandi koma.

So skulu tit til Aalborg ella har á leið í summar, og veðrið ikki skikkar sær sum ætlað, ber altíð til at leggja leiðina framvið Jumboland og hugna tykkum við børnunum.

Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR

og fá sertilboð sendandi við telduposti
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo
Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo